**AGANEVNDIN**

**KÆRA 10/2014**

| | |
|---|---|
| ***FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:*** | |
| **Málsheitið: B68 kærir FC Suðuroy fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 13.09.2014 | Aganevndin móttikið kæru: 22. september 2014 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

# Úrskurður

Aganevndin gongur ikki kæruni frá B68 á møti, har kært verður um, at FC Suðuroy hevur nýtt ólógligan leikara í dysti millum B68 og FC Suðuroy 13. sept. 2014 í 2. deild hjá monnum fyri vantandi yvirsiting av leikbanni.

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

B68 hevur kært FC Suðuroy fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum B68 og FC Suðuroy tann 13. september 2014 í 2. deild hjá monnum.

Í kæruni vísir B68 á, at FC Suðuroy hevur nýtt ein ólógligan leikara í dystinum tann 13. september 2014, og at talan er um leikaran Búa Egilsson, sum hevur fingið 5 gul kort í 1. deild, og sum nú – tað er dysturin 13. sept. - leikar við 2. deild monnum.

Kæran frá B68 hevur verið til hoyringar hjá FC Suðuroy, sum hevur hesar viðmerkingar:
Nevndi leikari fekk sítt 5. gula kort í dysti í 1. deild monnum tann 23. august 2014, og bleiv tískil leikbannaður. Felagið vísir til § 8, 2 í Kappingarreglum fyri Fótbólt, og sigur, at sambært hesi reglu er leikari leikbannaður fyrst komandi dyst /dystir í øllum vaksnamannadeildum, sum hann annars kundi luttikið í.

FC Suðuroy vísir eisini á, at næsti dystur, sum leikarin annars kundi havt leikt lógliga í, um hann ikki hevði leikbann, var í 2. deild monnum tann 06. Septembur 2014, og tá sat leikarin yvir dyst í 2. deild, meðan 1. deild hevði frívikuskiftið.

At enda vísur FC Suðuroy á, at leikarin eisini sat yvir dyst í 1. deild tann 13.09.2014, men at hann síðani leikti lógliga við 2. deild monnum 13.09.2014.

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 13. september 2014 varð dystur leiktur millum B68 og FC Suðuroy í 2. deild hjá monnum.

Leikarin Búi Egilson leikti fyri FC Suðuroy í omanfyri nevnda dysti. Hesin leikari er undir 21 ár.

Sambært upplýsingum frá FSF umsitingini fekk leikarin sítt 5. gula kort í dysti í 1. deild monnum tann 23. august 2014 og bleiv tískil leikbannaður.

Tey fyrstu umførini í 1. og 2. deild hjá monnum í landskappingini eftir 23. august eru spæld soleiðis:

6. september: 2. deild, B36 – FC Suðuroy

13. september: 1. deild, EB/Streymur – FC Suðuroy
13. september: 2. deild, FC Suðuroy – B68

Sambært upplýsingum av dómaraseðilunum, leikti leikarin ikki við í dystinum í 2. deild 6. september ímóti B36. Leikarin leikti heldur ikki við í 1. deildardystinum ímót EB/Streymi 13. september. Hinvegin leikti leikarin við 2. deild, 13. september, ímóti B68.

## 5. Lógarverkið

Umrøddi leikari, Búi Egilson, er undir 21 ár og er tí fevndur av serskipanini fyri ungar leikarar sambært § 8, stk. 2 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

Sambært reglunum um givnar ávaringar, ásetur § 37b. stk. 3 í kappingarreglunum fyri fótbólt, at "Galdandi fyri Meistaradeildina og 1. deild menn. Tá leikari hevur fingið 5 gul kort, fær hann 1 dag leikbann. Tá leikari harnæst hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann. Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann. Tá leikari harnæst hevur fingið tvey (2) gul kort fær hann tveir dagar leikbann. Hvørt gult kort givið eftir hetta, gevur leikbann á ein dag. Leikbann eftir hesi reglu eru galdandi frá fyrst komandi leikdegi."

§ 37b, 4. pkt. í Kappingarreglunum ásetur: "Er talan um leikara, sum er fevndur av § 8, stk. 2 í kappingarreglunum, og sum verður leikbannaður í vaksnamannadeild, verður leikarin leikbannaður fyrst komandi dyst/dystir í øllum dystum í vaksnamannadeildini, sum hann annars lógliga kundi luttikið í."

§ 37b, stk. 4 í kappingarreglunum fyri fótbólt ásetur neyvari, hvussu og nær leikari skal yvirsita leikbann fyri aftur lógliga at kunna leika dyst. Her er ásett, at "Givnar ávaringar føra við sær leikbann fyri viðkomandi leikara í teirri deild hann hevur fingið ávaringina. Ávaringar givnar í steypakappingum eru bert galdandi fyri dystir í steypakappingini. Tó er leikara ikki loyvt at leika í lægri deild enn henni, sum hann er leikbannaður í, samtundis sum hann situr yvir leikbann í hægri deild, orsakað av givnum ávaringum."

§ 8, stk. 2 ásetur, at "Leikari, sum ikki er fyltur 21 ár 1. januar í kappingarárinum, men sum lýkur treytirnar fyri at luttaka í vaksnamannadeildini, kann leika tveir dystir sama leikdag. Víst verður

| | |
|---|---|
| annars til grein 9." | |
| **6. Staðfestingar, metingar, o.t.** | |
| Aganevndin staðfestir, at umrøddi leikari varð raktur av leikbanni eftir at hava fingið 5. gula kortið í 1. deildardysti, sum varð leiktur 23. august 2014. Staðfest verður eisini, at leikarin eftir hetta, hvørki leikti við 2. deild leikumfari 6. sept. ella við 1. deild leikumfari 13. sept.<br><br>Aganevndin staðfestir tí, at nevndi ungi leikari, sum er fevndur av serskipanini eftir § 8, stk. 2, hevur lokið lógarinnar krav um yvirsiting av leikbanni í báðum vaksnamannadeildum fyri givnar ávaringar og tí lógliga kundi leika dystin móti B68 tann 13. sept., tí sambært § 8, stk. 1 verður hægsta deildin roknað at hava leikt fyrst, tá felag leikar í fleiri deildum. | |
| **7. Niðurstøða** | |
| Leikarin Búi Egilson leikti lógliga í dystinum millum B68 og FC Suðuroy í 2. deild hjá monnum tann 13. september 2014. | |
| **8. Úrskurður** | |
| Aganevndin gongur ikki kæruni frá B68 á møti, har kært verður um, at FC Suðuroy hevur nýtt ólógligan leikara í dysti millum B68 og FC Suðuroy 13. sept. 2014 í 2. deild hjá monnum fyri vantandi yvirsiting av leikbanni. | |
| **9. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.** | |
| Avgerðin kann sambært agareglugerðini ikki kærast til Yvirkærunevndina. | |
| **10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**<br><br>**Tórshavn 2. oktober 2014**<br><br>Ingunn Ó. Eiriksdóttir, forkvinna | |